## Ísbjørnin ikki hótt

Guvernørurin í statinum Alaska, Sarah Palin, heldur lítið um avgerðina hjá stjórnini í Washington at seta ísbjørnina á listan yvir djór, sum eru í vanda fyri at doyggja út. Við USA Today sigur hon, at avgerðin er tikin á alt ov veikum grundarlagi, og nú ætlar hon at noyða stjórnina at broyta avgerðina. Sarah Palin sigur, at verður ísbjørnin friðað, fer stovnurin at veksa, og tað kann órógva oljuvinnuna í Alaska, sigur hon við USA Today.



*Ov nógvar ísbjarnir kunnu órógva oljuvinnuna í Alaska*
*(Mynd: KNR)*

# Ein serstakur dámur er yvir bátastevnum



*Jóhan Martin Thomasen úr Kvívík og hansara fólk í bátinum Sólgerð*

**Meðan bátastevna var í Vestmanna, var ymiskt til undirhalds í ítróttarhøllini, og Jóngerð M. Nielsen, forkvinna í VÍF, sigur, at bygdin hendan frálíka leygardag og sunnunátt minti um eina góða ólavsøkunátt**

BÁTASTEVNA
*Orð: Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

Bátastevnur eru nú ein fastur táttur av føroyska summarinum og stevnunum kring landið. Sum árini eru liðin, eru bátafeløg stovnað, og sigling í stuttleikabáti er vorðin ein nýggjur háttur at hugna sær saman. Tað eru longu fleiri ár síðan, at føroyingar á fyrsta sinni vóru á bátaferð í Noregi, og tá oyggjaleikir vóru í Hetlandi fyri trimum árum síðan, vóru nógvir føroyskir bátar á bátaferð í Hetlandi.

Í sjey ár hava vestmenningar skipað fyri regluligari bátastevnu, og bátastevnan á Toftum hevur nú eisini nøkur ár á baki.

Ovastevna, sum liggur nakrar dagar eftir ólavsøku, er eisini vorðin partur av eini bátastevnu. Bátarnir savnast á Eiði fríggjadag, har siglingin suður gjøgnum Sundalagið byrjar. Lagt verður inn í Hósvík, har bátarnir liggja á nátt. Síðan verður stevnt út til Nólsoyar leygardag.

Tað eru tó ikki bara bátastevnurnar, sum savna bátar og bátsfólk. Regluligu summarstevnurnar, eitt nú norðoyastevna og jóansøka, plaga eisini at savna bátar, um líkindi eru, og tað hava summarfestivalarnir í Gøtu og Klaksvík eisini gjørt.

### Veðrið avgerandi

Jóngerð M. Nielsen, forkvinna í VÍF, sigur, at bátastevnan í Vestmanna leygardagin eydnaðist serstakliga væl.

- Veðrið er alt avgerandi, og hesaferð vóru veðurgudarnir rættiliga við okkum.

Hon sigur, at tað var ógvuliga stuttligt at síggja, hvussu nógv fólk høvdu riggað seg til at koma á bátastevnu.

- Tað skerst ikki burtur, at ein serstakur hugni og dámur er við bryggjuna á eini slíkari stevnu. Tá suppan, sum stigtakararnir borðreiða við, er fingin niður um, ganga fólk millum bátarnar og hugna sær við práti, etandi og leskandi. Hýrurin er góður.

Meðan bátastevna var í Vestmanna, var ymiskt til undirhalds í ítróttarhøllini, og Jóngerð vísir á, at bygdin hendan frálíka leygardag og sunnunátt, tá góður dansur eisini var í høllini, minti um eina góða ólavsøkunátt.

- Fólk gingu aftur og fram í bygdini og millum bátarnar og ítróttarhøllina.

Forkvinnan í VÍF sigur, at alt eydnaðist til fulnar, og hetta var ikki minst góðari fyrireiking, góða veðrinum og stóru undirtøkuni fyri at takka.

Á bryggjuni leygarkvøldið spældu og sungu Sámal Ravnsfjall og Jóan J. Guttesen, og samstundis vórðu búffar grillaðir og seldir teimum mongu vitjandi.

Eini 1200 bátafólk og onnur fingu suppu í tjaldinum á bryggjuni, nógvir búffar vórðu seldir, og uppi í ítróttarhøllini gekk dansurin við lokalu tónleikabólkunum, Thunderbirds og Bridge, fyri fullsettari høll.

### Vandin lúrur

Til tess at tryggja sær, at eingin datt niður ímillum við bátarnar, var Reyði Krossur á staðnum og helt vakt saman við fólki hjá Sløkkiliðnum í Vestmanna.

Jóngerð M. Nielsen ásannar, at tað lúrir altíð ein ávísur vandi, tá so nógvir bátar savnast, og nógv fólk ganga umborð á bátar, millum bátar og framvið bryggjuni.

- Í fyrsta lagi er neyðugt at tryggja seg við neti, so kjansurin at detta niður ímillum gerst minni, og í aðrar mátar er neyðugt, at gott vaktarhald er framvið bryggjuni, sigur hon.

Ein drongur datt á sjógvin við fiskavirkið í Vestmanna, har bátar lógu við bryggjuna, men tíbetur stóðst ikki



*Bátar úr ymiskum heraðshornum stevndu norður í Vestmannasund leygardagin*